# KÍ hoyrir hei

## Ítróttarfelagið KÍ úr Kunoy eigur ikki færri enn 4528 fermetrar av jørð oman fyri bygdina í Kunoy



### Gamalt felag

**Birgir Waag Høgnesen**
birgir@sosialurin.fo

Ikki munnu tað vera mong, sum vita um eitt ítróttarfelag, ið eitur Kunoyar Ítróttarfelag stytt KÍ.

Tá vit á Sosialinum herfyri vóru inni á heimasíðuni www.kagi.fo, komu vit fram á upplýsingar, sum benda á, at eitt ítróttarfelag einaferð, ella møguliga enn, er til í Kunoy.

Eigarauppl‌ýsingar fyri martikul nummar 70, sum er eitt stykkið, ið liggur sunnan fyri viðarlundina í bygdini Kunoy, vóru so mikið áhugaverdir, at vit settu okkum fyri at kanna málið.

Staðið, har stykkið er, eitur "Uppi á Dal" og er 4783 fermetrar til víddar. Ì dag sæst farvegur eftir einum fótbóltsvølli og tvey mál standa har í dag. Tá vit vóru í kunoy sást tíðuligt slit á grasvøllinum, so børn brúka enn hetta stykkið til hugnafótbólt.

Vit kunnu her upplýsa, at hetta stykkið hevði verið ov lítið til ein góðkendan FIFA-fótbóltsvøll í formuladeildini. Tí eftir reglum hjá FSF krevur ein slíkur vøllur 6200 fermetrar, so kunoyingar mugu keypa meira jørð, um so er, at teir ætla sær ein slíkan vøll.

Vit hava gjørt eitt ávíst arbeiði fyri at leita upp gerðabøkur og ymiskt annað, sum felagið eigur, og tað hevur eydnast í ávísan mun.

Vit settu okkum í samband við nakrar kunoyingar, sum vilja verða ónevndir, teir siga, at felagið KÍ eigur bæði ítróttarøkið og hartil eisini eina konto í Norðoya Sparikassa.

Okkurt av heimildarfólkum okkara vilja vera við, at felagið er stovnað í 1890-unum og var eisini eitt lesifelag. Onnur, vit hava tosað við, eru ikki samd um árstalið 1890, men vit kunnu staðfesta, at Kunoyar Ítróttarfelag í hvussu so er hevur havt aðalfund 5. februar 1923, og frá tí fundinum hava vit lógir felagsins, sum eru at finna aðrastaðni á hesi síðuni.



*Onkur fólk vilja vera við, at ítróttarfelagið í Kunoy varð stovnað longu í 1890'unum*

Sosialurin